Royna at trekkja tenninar úr okkum

– Ta› stendur í botni í samrá›ingunum ímillum Starvsmannafelagi› og Fíggjarmálast‡ri› um lønina hjá dekkarunum, sum skulu sigla vi› n‡ggja vaktarskipinum, Brimli. Nú roynir Fíggjarmálast‡ri› at trekkja tenninar úr Starvsmannafelagnum fyri at fáa fri› framyvir

ÓSEMJAN UM BRIMIL
Áki Bertholdsen

Ta› eru ikki bara Skipara- og Navigatørfelagi› og Maskinmeistarafelagi›, sum eru ósamd vi› Fíggjarmálast‡ri› um lønina hjá teimum, sum skulu sigla vi› n‡ggja vaktarskipinum, Brimli.

Nógv teir flestu av manninginí á Brimli ver›a limir í Starvsmannafelagnum. Og samstundis, sum n‡ggjur sáttmáli skal gerast um lønina hjá yvirmonnunum á Brimli, skal eisini n‡ggjur sáttmáli gerast vi› Fíggjarmálast‡ri› og Starvsmannafelagi› um lønina hjá dekkarunum á n‡ggja vaktarskipinum.

Men heldur ikki tær samrá›ingarnar ganga fyri sei›i, og har stendur í botni. Gunnleivur Dalsgar›, forma›ur í Starvsmannafelagnum, sigur, at higartil er ta› ikki eydnast at flyta eitt komma, ella eitt prosent í samrá›ingunum, so ta› bo›ar ikki frá gó›um.

Leypa á fakfeløgini

Forma›urin í Starvsmannafelagnum sigur, at nú hevur Brimil ligi› í hálvan annan mána›a, er vónloysi› í Fíggjarmálast‡rinum so stórt, at teir vita sær ongi onnur rá›, enn at royna at máa stø›i› undan fakfeløgunum.

Fíggjarmálast‡ri› bjó›a›i í farnu viku bæ›i Navigatørunum og Maskinmeistarunum at gerast tænastumenn.

Og sama tilbo› hava dekkararnir fingi›.

– Hetta er ein roynd at trekkja tenninar úr fakfeløgunum, sigur Gunnleivur Dalsgar›.

Ta›, hann sipar til, er, at tænastumenn hava ikki loyvi til at fara í verkfall.

Hann sigur, at fundur var ímillum Fíggjarmálast‡ri› og Starvsmannafelagi› leygardagin, har spurningurin um at gera dekkararnar til tænastumenn, var› umrøddur

Ætlanin hjá Fíggjarmálast‡rinum er so langt úti, at ta› er ikki so miki› sum vert at vi›gera, sigur Gunnleivur Dalsgar›, forma›ur í Starvsmannafelagnum

Men tann fundurin var ógvuliga stuttur.

– Ta› tók okkum ikki langa tí› at vísa tí tilbo›num aftur, sigur Gunnleivur Dalsgar›.

Hann sigur, at hetta er so langt úti, at ta› er ikki vert at vi›gera. Fleiri vi›merkingar hevur hann ikki til ta›.

Hann sigur annars, at uppskoti› um lønarhækking, sum Fíggjarmálast‡ri› leg›i fyri Starvsmannafelagi› minnir um ta›, sum ta› leg›i fyri yvirmannafelagøgini.

Eftir tí, sum á›ur er upplˆst, var ta›, sum Fíggjarmálast‡ri› bjó›a›i yvirmannafeløgunum ein lønarhækking upp á runt rokna 19,5%. Men harav skuldu 15% fara til eftirløn so at veruliga lønarhækkingin var uppá 4,5%

Ókeypis at stovna

Royn allar møguleikarnar!

- Boðtóni
- Parkering
- Trípartasamrøða
- "Trýst 5"
- Veking
- Víðaristilling
- Vís nummar
- Fastur móttakari
- Stutt nummarval
- Sperr við loynitali
- Órógva ikki

Til 1. mars 2001 eru tænasturnar til fastnetið ókeypis at stovna, og mánaðargjaldið er kr. 15,- fyri hvørja tænastu. Les meira í faldaranum, ið verður borin í hvørt hús...

FØROYATELE
tel 80 80 80

petur & petur • 320870

Smyril Line ver›ur ikki bjarga ›

Landsst‡ri› vil ikki ve›halda fyri einum láni á 30 milliónir krónur, i› skal til fyri at bjarga Smyril Line. Vandi er nú fyri, at t‡ska skipasmi›jan, sum byggir n‡ggju Norrönu, dregur inn gomlu Norrönu fyri skuld

KREPPA
John Johannessen

Á landsst‡risfundi gjáramorgunin var› gjørt av, at landi› ikki skal vera vi› til at bjarga Smyril Line, sum er komi› í svára fíggjarliga kreppu.

Smyril Line skyldar t‡sku skipasmi›juni, sum byggir n‡ggju Norrönu eitt av gjøldunum, sum ta› í sáttmála hevur bundi› seg til at gjalda, me›an n‡ggja Norröna ver›ur bygd.

T‡ska skipasmi›jan hevur higartil lutvíst gó›tiki› at bi›a vi› at krevja peningin, men afturfyri skal Smyril Line á›renn t‡sdagin kunna prógva fyri skipasmi›juni, at felagi› er nóg sterkt til at kunna rinda n‡ggju Norrönu. Fyri at hetta skal bera til krevst, at Smyril Line megnar at hækka partapeningin vi› 75 milliónum krónum á›renn fundin vi› t‡sku skipasmi›juna t‡sdagin.

Norröna er ve›

Í sáttmálanum, sum Smyril Line gjørdi vi› t‡sku skipasmi›juna 27. juni í ár, er gamla Norröna sett í ve› fyri gjøldunum til skipasmi›juna. Tí er vandi fyri, at skipasmi›jan rætt og slætt fer avsta› vi› henni, klárar Smyril Line ikki at sannføra skipasmi›juna um, at gjaldføri› er í lagi.

Hendan stø›an, sum Smyril Line er komi› í, tók seg upp í seinna enda av oktober. Tá gjørdu partarnir av at útseta arbei›i› uppá n‡ggju Norrönu eitt ár. Men Smyril Line skuldi kortini gjalda sína skuld til t‡sku skipasmi›juna.

Tríggjar vikur seinni, tann 10. november, kunna› lei›slan í Smyril Line landsst‡rismannin í vinnumálum um, at felagi› hev›i havt eitt vánaligt úrslit seinasta ári›. Men Smyril Line ba› tó ikki um almennan stu›ul.

– Ta› var einki á hesum fundi, sum bendi á, at lei›slan í Smyril Line vildi hava pening frá landinum. Talan var bert um ein kunnandi fund, har víst var› á vánaliga úrsliti›. Men samstundis gjørdi lei›slan eisini greitt, at felagi› arbeiddi fram ímóti at hækka partapeningin, sigur Bjarni Djurholm, landsst‡risma›ur í vinnumálum.

Fríggjadagin í farnu viku, tann 1. desember, ver›ur landsst‡risma›urin í vinnumálum aftur bo›in til kunnandi fund hjá Smyril Line saman vi› møguligum innskjótarum. Teir møguligu innskjótararnir eru Framtaksgrunnurin, Tryggingarfelagi› Føroyar og Lív. Heldur ikki á hesum fundinum var› bi›i› um almennan stu›ul.

Sí›ani gekk umlei› ein vika, til landsst‡risma›urin seinasta mikudag fekk at vita, at innskjótararnir ikki vóru áhuga›ir at seta pening í Smyril Line. Hetta enda›i vi›, at landsst‡risma›urin hósdagin fekk eina formella umsókn um landi› kundi ve›halda fyri 30 milliónum í einum láni, i› skuldi bjarga felagnum.

Landsst‡ri› kunna›

Bjarni Djurholm sigur, at hann sí›ani 10. november allatí›ina hevur kunna› landsst‡ri› um gongdina í málinum, so hvørt naka› n‡tt hevur veri› at frætta.

Tá landsst‡risma›ur hósdagin fekk umsóknina um ve›hald, kunna›i hann beinan vegin løgmann og sí›ani landsst‡ri›. Seinnapartin hósdagin kunna›i hann eisini formenninar í øllum tingbólkunum, tí hann metti stø›una vera sera álvarsliga.

Tá hetta var› gjørt, heitti landsst‡risma›urin á umsitingina í Vinnumálast‡rinum um at gera ein samandrátt av málinum og at meta um stø›una.

Frágrei›ingina fekk Bjarni Djurholm klokkan hálvgum átta gjáramorgunin. Tá hann hev›i gjøgnumgingi› frágrei›ingina, fór hann á fund vi› landsst‡ri›, sum samt gjørdi av ikki at ganga umsókini um ve›hald á møti.

Orsøkin til grei›u stø›una hjá landsst‡rinum er, at landsst‡ri› ikki aftur vil koma inn í ve›haldsmylluna frá áttatiárunum, og at landsst‡ri› ikki longur hevur heimild at veita ve›hald.

Løgtingi› kann játta

Hóast landsst‡ri› hevur gjørt av at s‡ta fyri at bjarga Smyril Line, er enn ein lítil møguleiki fyri, at ta› ver›ur politiski myndugleikin, í› bjargar felagnum.

Løgtingi› kann samtykkja at heita á landsst‡ri› um at seta ávísa upphædd í Smyril Line sum partapening. Men enn fyriliggur einki uppskot um hetta. Skal landi› bjarga Norrönu og fer›avinnuni, er ney›ugt, at løgtingi› ber skjótt at.

Tá Sosialurin á middegi í gjár tosa›i vi› formenninar í ymisku flokkunum, hev›i eingin teirra havt stundir at vi›gera stø›una.

Nevndarforma›urin sigur einki

SMYRIL LINE
Ey›un Klakstein

Nevndarforma›urin í Smyril Line, íslendingurin Jónas Hallgrímsson, vil ikki gera vi›merkingar til stø›una í felagnum.

– Eg havi einki at siga í løtuni, seg›i hann, tá Sosialurin fekk fatur á honum fyrrapartin í gjár.

Hann vísir til stjóran í felagnum, Óla Hammer, sum ikki hevur veri› til at fingi› fatur á seinastu dagarnar.

Í nevndini hjá Smyril Line sita Jónas Hallgrímsson, sum er forma›ur, Óli Hammer, sum er næstforma›ur, Thomas Arabo, Knút Nolsøe, Einar Waag, Jógvan í Dávastovu og Heri Mørkøre.

Sjálvandi heim við Norrönu til jóla!
Úr Hanstholm 16. ella 20. desember
Úr Tórshavn 29. desember ella 5. januar

16. & 20. des. er beinleiðis bussamband úr Aalborg til Hanstholm
30. des. & 6. jan. er beinleiðis bussamband úr Hanstholm til Aalborg

Úr bert 1.070,- annan vegin
Lesandi úr bert 803,-
Eftirløn úr bert 535,-

Bilpakkatilboð
við 4 fólkum í bilinum úr bara 910,- fyri hvonn annan vegin

Bíleggið í góðari tíð!

SMYRIL LINE
Tel 34 59 00
E-mail: booking@smyril-line.fo
www.smyril-line.fo